BÝRÁÐSSKRIVSTOVAN TVØROYRAR BÝRÁÐ
www.tvoroyri.fo · tvoroyri@tvoroyri.fo · tlf 611085 · fax 371814 · postboks 80 · FO 800 Tvøroyri

# Mannagongd í sambandi við keyp av vørum og tænastum fyri Tvøroyrar kommunu

Fyri at fyrisitingin kann hava sporføri í sambandi við roknskaparstýringina, og fáa kunning um, hvør hevur keypt vørur og tænastur fyri Tvøroyrar kommunu, skulu starvsfólk og rakstrarstøð hjá kommununi framyvir halda seg til hesa mannagongd.

Mannagongdin hevur sítt grundarlag í kommunustýrislógini um fíggjarumsiting, kunngerð um roknskaparverk kommunanna um roknskaparstýring og rundskriv hjá Fíggjarmálaráðnum um KT útbúnað.

## Alment

- Øll rakstrarstøð skulu hava fyri eyga fíggjarligt skynsemi, tá vørur og tænastur verða keyptar fyri Tvøroyrar kommunu.
- Øll rakstrarstøð skulu nýta innkeypskort ella rekvisitiónir.
- Innkeypskort verða nýtt á Strandferðsluni, Bónus og á bensinstøðunum og hava leiðararnir á rakstrarstøðunum fingið hesi útflýggja.
- Alla aðrastaðni skulu rekvisiónir verða nýttar.

## Nýtsla av rekvisitiónum

<u>Tá rekvisitónir verða nýttar, skulu tær fyllast út á henda hátt:</u>

- Hvat rakstrarstað hoyrir rekvisitiónin til?
- Hvør hevur umbiðið vøruna/tænastuna?
- Hvør hevur heinta vøruna/tænastuna?
- Vøruheiti + leverandørur:
- Dato:
- Undirskrift av leiðara á rakstrarstaðnum:

<u>Tá keypt verður frá Føroya Tele skal rekvisiónin verða undirskriva av einum av hesum persónum:</u>

- Borgarstjórin
- Kommunustjórin
- Tekniskur leiðari
- Fíggjarleiðari
- Skúlastjóri

**Keyp av tøkniligum útbúnaði til arbeiðsbrúk**

Tá nýggj fartelefon, teldlar og fartelda verður keypt:

- Tað er leiðarin á rakstrarstaðnum, sum avgerð, um starvsfólk sum liður í teirra arbeiði skulu hava útflýggja fartelefon, teldlar og/ella farteldu, sum Tvøroyrar kommuna rindar. Leiðarin skal í hesum førinum gera ein ítøkiliga meting um hvønn tørv, starvsfólk hava á KT úbúnaði í teirra starvið.
- Tvøroyrar kommuna rindar fyri fartelefonina, tó í mesta lagi kr. 3.500,- Um fartelefonin, sum verður keypt, er dýrari enn hetta, má starvsfólkið gjalda meirupphæddina sjálv/sjálvur. Tvøroyrar kommuna rindar fyri brúk- og trygging av fartelefonini.
- Tvøroyrar kommuna rindar fyri teldil og/ella farteldu, sum starvsfólk hevur tørv á í arbeiðinum.

**Avgreiðan av KT útbúnaði, tá starvsfólk fara úr starvi**

- Tá starvsfólk fara úr starvi verður KT útbúnaður teirra – fartelefon, teldil og telda - sum Tvøroyrar kommunu hevur fíggja, burturbeindur eftir galdandi forskriftum soleiðis at útbúnaðurin ikki er til skaða ella ampa fyri umhvørvið.
- Starvsfólk, sum fara úr starvi, kunnu eisini gera avtalu við Tvøroyrar kommunu um at keypa KT útbúnaðin sambært galdandi reglum.
- Verður KT útbúnaðurin latin øðrum starvsfólkum at brúka, skal teldan setast upp (reinstallerast) av nýggjum samsvarandi trygdarásetingum hjá Tvøroyrar kommunu og KT Landsins.

**Samtykt og góðkend**

Tvøroyrar býráð hevur á fundi tann 22. mai 2018 samtykt, at góðkenna hesa mannagongd.

**Gildiskoma**

Mannagongdin kemur í gildi tann 1. juni 2018.

Tvøroyri, 23. mai 2018

Anita Vibergsdóttir
Virkandi borgarstjóri

Henrik Weihe Joensen
Kommunustjóri